# Starvsfólk til kredittdeildina

**Kredittdeildin hevur ábyrgd av kredittpolitikki bankans, samskifti við deildir bankans, stýring av bankans váða, inkasso, viðgerð av stórum lániumsóknum o.ø. Í løtuni leita vit eftir dugnaligum starvsfólki at arbeiða við okkara inkassovirksemi.**

### Starvið

Sum starvsfólk á kredittdeildini verður tú bindilið ímillum Føroya Banka og sakførarar. Tú kemur m.a. at gjøgnumganga og taka støðu til mál, sum koma til innheintingar, at umsita skuldarumsitingar, bú- og konkurstilmeldingar o.a. Tú skalt eisini vera til reiðar at luttaka í øðrum arbeiði á kreditt-deildini.

### Tú

Tú arbeiðir við nærlagni, ágrýtni og torir at taka ábyrgd. Tú samstarvar væl og dugir samstundis væl at arbeiða sjálvstøðugt. Harumframt hevur tú viðkomandi útbúgving ella royndir innan bankaverðina ella sum advokatskrivari. Umsøkjarar við kunnleika til peningastovnsarbeiði, eitt nú lán og kredittir, hava fyrimun.

### Meira at vita

Fyrispurningar eru vælkomnir til Torbjørn Andreassen, kredittleiðara, á telefon 330 443 ella á ta@foroya.fo.

Skrivlig umsókn saman við avriti av CV og prógvum skal sendast til starvsfolk@foroya.fo ella til P/F Føroya Banki, Att: Bjarki Mohr, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn og skal vera okkum í hendi **í seinasta lagi 15. august 2008**.

SENDISTOVAN

**FØROYA**BANKI

# Ein av heimsins bestu vaskimaskinum

– nú eisini í Føroyum

**Á Shellstøðini við Ringvegin í Havn**




**Nú eisini Á Shellstøðini í Gøtudali**

### Tí er vaskimaskinan so góð:

- Fer betri við lakkinum enn hondvask!*
- Nú við superbleytum Softtecs bustum
- Nú eisini við lakkforsegling
- Hátrýst
- Spildurnýtt botnvask

*sí www.washtec.dk



Føroya Shell P/F | Vestara Bryggja 10 | Postboks 188 | FO-110 Tórshavn | Tel 34 74 00 | Fax 34 74 90 | shell@shell.fo | www.shell.fo